# TÍÐINDI
# FRÁ
# RUNAVÍKAR KOMMUNUSKÚLA



***So er byrjað at grava***

***oktober 2006***

**Skúlaársbyrjan.**

Sum nevnt í juniblaðnum so er næmingatalið við okkara skúla lækkandi. Seinasta skúlaár var næmingatalið 505, og pr. 1. september var tað 457. Tvs. ein lækking uppá 48 næmingar.

Grundirnar til eina so ógvisliga minking eru helst fleiri. Vit hava havt nakrar serliga stórar árgangir inni í skipanini, har næmingatalið hevur ligið u.l. 60. Hesir eru við at glíða út nú. Í løtuni er bert 9. árgangur eftir, sum hevur so nógvar næmingar. Sostatt kunnu vit vænta, at næmingatalið kemur at lækka nakað afturat 2 tey komandi árini, áðrenn tað kemur at stabilisera seg við árgangum u.l. 40.

Eisini valdu lutfalsliga nógvir næmingar, sum gingu í 9. flokki seinasta ár, ikki at halda fram í 10. flokki. Hesir valdu antin at fara í miðnámskúla ella eisini at fara úr skúlanum í arbeiði ella í handverkslæru.

**Náttarravnarnir.**

15. september vóru allir 7. flokkarnir og allar framhaldsdeildirnar í Eysturoynni við í einum tiltaki, sum felagið Náttarravnar í Havnini skipaði fyri. Tiltakið var í ítróttarhøllini í Runavík, og mundu einir 300 næmingar saman við lærarum vera samlaðir fyri at hoyra eina kvinnu úr Danmark sera væl og livandi greiða frá, hvussu hon, sum annars hevði havt eina ynskibyrjan uppá sína lívsleið, tilvildarliga var komin sær út í óføri orsaka av evnismisnýtslu. Hon tók studentsprógv, og fyri at løða upp til víðari lestur, valdi hon at fara út at fjakka í eitt ár, og var tað á hesi ferðini, at hon av tilvild var komin í samband við rúsevnir – fyri hennara viðkomandi ecstasy. Hóast hon bert nýtti evnið í stutta tíð, so var hetta nóg mikið til, at hon fekk varandi heilaskaða, sum ger, at hon ikki er før fyri at liva eitt normalt lív – og kemur ongantíð til at fáa tað øðrvísi. Heilin er varandi skaddur.

Tíverri eru ljóðviðurskiftini í eini ítróttarhøll ikki tey bestu. Serliga knípti tað áðrenn pausuna. Kortini kann sigast, at boðskapurin náddi út til okkara næmingar. So er bert at vóna, at teir duga at síggja vandan í tí at royna rúsevnir. Hendan kvinnan var skadd av ecstasy. Onnur rúsevnir eru minst líka vandamikil.

Felagið Náttarravnar eiga stóra tøkk fyri, at tað vil skipa fyri slíkum fyribyrgjandi tiltøkum. Sama kvøldið bjóðaði felagið foreldrum at ungum til fundar í fimleikahøllini á Glyvrum við tí endamáli at stovna ein náttarravnabólk inni í Eysturoynni. Tíverri var undirtøkan so lítil – bert 8 fólk møttu – at ætlanin datt niðurfyri.

**Psykiatribussurin.**

Fyri aðru ferð hevði skúlin í Runavík vitjan av psykiatribus-

sinum hjá psykiatrifondinum í Danmark. Hetta er ein stórur bussur, sum er innrættaður sum ein skúlastova, og sum er mannaður við einum sálarfrøðingi, sum í ár var føroyingur, og einum lærara – ein dani – sum hevði eftirútbúgving í sálarfrøði.

Skúlastovan hevur pláss fyri 24 næmingum, og hvør undirvísingin tók u.l. 2 tímar. Vit fingu pláss fyri 3 undirvísingum, og valdu vit at lata allar 9. flokkarnar fáa tilboðið. Evnini, sum vóru umrødd, vóru eitt sindur ymisk. Nevnast kunnu t.d. sorg, happing, rúsevnismisnýtsla, trupulleikar heima við hús, hvørja ávirkan hesir trupulleikar hava á ung, og hvussu hetta kemur til sjóndar hjá teimum, sum verða rakt av hesum trupulleikum.

Eisini hetta síggja vit sum eitt frálíkt tilboð, sum vit bert kunnu siga takk fyri. Her verða trupul evnir umrødd av fakfólki, eins og okkara næmingar, um teir ynskja tað, kunnu seta fram spurningar og fáa svar frá fakfólk.

**Skúlabyggingin.**

Mánadagin 2. oktober var almenn samkoma í Runavík í samband við, at byrjað varð uppá nýggja skúlan. Rættiliga fitt av fólki var samankomið. Tað var Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri, sum gróv fyrsta bøkkin. Í tí sambandi segði hann m.a., at hetta í byggitíðini kemur at seta stór krøv til okkum øll, sum hava nakað við skúlan at gera. Hann heitti á allar partar um at vísa tol og góðan vilja til at samstarva. Serliga hugsaði hann um næmingarnar og lærararnar. Óiva koma vit at fáa tíðir, har larmurin verður nógvur, tann tunga ferðslan verður eisini nógv, og ikki altíð koma vit at hava somu umstøður, sum vit eru von við. Hetta kemur at seta krøv, men hann heitti á okkum um at líta frameftir til tað lidna verkið, sum eftir ætlan kemur at standa liðugt um jóltíðir 2008.

Eisini Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentannarnevndini, og Jón Danielsen, stjóri í Articon, hildu røðu.



***Eisini eldra ættarliðið vísti ætlanini áhuga***

Sum ein lið í fyrireikingunum kallaði byggifelagið Articon starvsfólk skúlans til fundar hósdagin 28. sept., har Eyðun Petersen, projectleiðari, greiddi frá ætlaðu arbeiðsgongdini. M.a. greiddi hann frá, hvussu teir ætla at avskerma byggiøkið, og hvussu mannagongdin kemur at vera í samband við spreingiarbeiðið. Eisini fingu vit at vita, hvørjar mannagongdir koma at vera

galdandi við fráboðan ímillum skúla og byggipláss.
Mánadagin fingu næmingarnir somu kunning um arbeiðið, og hvussu teir skuldu fyrihalda seg mótvegis tí, sum fer fram á økinum. Amboðini eru stór og tung, tí er fullkomið bann hjá næmingunum at koma inn á byggiøkið. Kortini eru teir altíð vælkomnir til at seta spurningar, men hann ynskti, at hetta verður gjørt ígjøgnum læraran.

**Starvsvenjingin.**
Frá 11. – 22. september var 10. flokkur í starvsvenjing. Afturkomnir lata næmingarnir sum heild sera væl at. Arbeiðsplássini taka væl ímóti teimum, og tey halda seg hava fingið væl burtur úr.
Í fólkaskúlalógini er álagt skúlunum at næmingarnir í 9. og 10. flokki skulu í starvsvenjing í 2 vikur, men tað koma teir bara, um arbeiðsplássini vilja hava teir, og tá tað er ógvuliga ymiskt, hvussu stóra nyttu eitt arbeiðsplass fær av einum praktikkanti, so kunnu vit ikki annað enn vera takksom fyri ta vælvild, sum skúlin møtir, hvørja ferð vit koma við áheitan um praktikkpláss.

**Verkætlanararbeiði.**
Ímeðan 10. flokkur hevur verið í starvsvenjing, hevur 9. flokkur arbeitt við síni verkætlanaruppgávu. Yvirorðnaðu evnini hava verið ung og mentan.

**Sjónleikaravitjan.**
Fyrst í september fingu næmingarnir í teimum smærru flokkunum møguleika til at síggja sjónleikin Ævintýrferðin. Framførslurnar – tær vóru tvær – vóru í fimleikahøllini á Glyvrum. Sýningarnar vóru sera væleydnaðar, ikki minst tí at nógv varð sungið, og børnini kendu sangirnar. Ein góð byrjan hjá teimum smáu uppá eitt nýtt skúlaár.

**Rithøvundavitjan.**
29. september bjóðaði Bókadeild Føroya Lærarafelags til ein sokallaðan rithøvundadag í Norðurlandahúsinum, har næmingar kundu hoyra og koma á tal við nakrar av fremstu rithøvundum í norðurlondum. Frá okkum luttóku 7. flokkarnir saman við teirra lærarum, og høvdu tey ein frálíkan dag í Havn.

**Árliga skúlarenningin.**
Rennidagurin verður fríggjadagin 6. okt.. Allar næmingarnir møta kl. 8. Bussarnir koyra sum vanligt. Skúladagurin er liðugur u.l. kl. 12.

**Heystfrítíðin.**
Heystfrítíðin í ár er so tíðliga, sum hon fær verið. Siðvenja hevur í nógv ár verið, at 15. oktober skal liggja í heystfrítíðini. Í ár er 15. oktober sunnudag. Sostatt er ferian í ár frá leygardegnum 7. til sunnudagin 15. okt. Góða heystferiu.